# Poula Mohr 80 ár

## 15. juli 2006

Góða Poula !

Vit øll Vesturi í Bø 5 ynskja tær hjartaliga tillukku við 80 ára føðingardegnum, og vilja vit takka tær fyri alt tú ert og hevur verið fyri okkum. Fyrst takki eg tær fyri Hans, Harranum fyri okkara elskaðu børn og svigerson. Tú hevur verið ein góð vermóður at átt hesi 30 ár. Eg kann minnast frá barni av, hvussu tú vart um tíni, mann og synir og øll tey sum komu á gátt hjá tykkum.



Í heimi tykkara fór mangt fram, vóru gardinurnar fyri í stovuni var heimabiografur, sunnudagsskúlablaðið " Vitin", sum Hans og Jógvan á Lakjuni góvu út, bleiv prenta uppi á loftinum og sjónvarpsantennur blivu settar á takið. Kettur og fuglar høvdu tit eisini og ikki at forgloyma tíkina Heidi, sum tit vóru sera góð við. Alt hetta last tú um teg ganga. Ja, tað eru mong ung sum hava sitið væl inni hjá tykkum og nýtt tykkara gestablídni.

Jákup fór bara alt ov tíðliga frá okkum, vit hava eisini nógv at takka honum fyri. Hann gleddist so nógv um tykkara fyrstu ommu- og abbabørn Bjørg og Rógva, tað var einki óført, tá tað kom til tey, tey vóru 11 og 9 ár, tá hann bleiv tikin frá okkum, Jákup og Petur vóru tá bert 5 og 6 mánaðir gamlir. Tey eru nú átta í tali: Pauli, Helgi, Pól og Poula eru komin síðani. Bjørg tann elsta og Poula tann yngsta. Sum tú plagar at taka til, standa varðarnir eftir hann sum tann góði hondverkarin hann var. Hann náddi at byggja tykkara synum: Hans, Poul Jákup og Øssur hús, sum øll standa í Fuglafirði, so tú hevur øll rundan um teg. Tú hevur klára teg ótrúliga væl nú skjótt 18 ár eru liðin. Tú hevur lagt alt í Harrans hendur.

Barnaárini vóru eisini svár hjá tær, góða Poula, pápa tín misti tú bert 10 ára gomul, árið framman undan systir tína Judith, bert 3 ára gomul og Mariu sum 25 ára gomul. Tit vóru 11 syskin, og eftir eru 5, Jóhannes og Judmund Øregaard, Rosa Eldevig og Robert á Lakjuni, sum býr í barnaheiminum niðri á Lakjuni.

Sjálvt um tú nú fyllir 80 ár, vilt tú klára teg sjálv, trúut hevur tú altíð verið. At koma inn á gólvi hjá tær er altíð hugnaligt, tú ert altíð klár við einum kaffimunni og onkrum heimabakaðum afturvið. Altíð hevur tú gingið høgt uppí mat, vit gloyma ikki tær vælsmakkandi frikadellurnar og blóðpylsurnar og annan góðan føroyskan mat, tú sendi til okkara, tá vit búðu í Danmark. Allar hosurnar tú hevur bundi og bindur enn uppá tíni, tað fer ongin føðingardagur forbí uttan mannfólkini fáa eitt par av hosum í pakkanum við einari fittari heilsan við.

Hetta er bert ein partur av øllum. Tú ert ein gudsóttandi kvinna, trúføst komin í Siloa, so trúføst at um tú ikki ert á møti, so verður ringt og spurt "Er nakað í vegin Poula ?" Hetta biði eg eftir, at vit kunnu bera víðari. Tú kanst gleðast um tað, at øll tíni hoyra Harranum til.

Poula, eg fari enn einaferð at ynskja tær hjartaliga tillukku, og mátti Harrin styrkt teg og givið tær ein góðan byrð framyvir.

**Tær allar bestu heilsanir frá okkum øllum Vesturi í Bø 5 og á Kirkjuvegi 8**

---

# Theodor Eliasen 85 ár

Ein heilsan til abba nú hann fyllir 85 ár.

Góði abbi, eg vil hervið skriva nøkur orð til tín, nú tú fyllir 85 ár.

Tað eru nógv minnir, sum koma framfyri meg, tá eg hugsi um teg abbi, og ølleru tey góð. Eg minnist, tá eg sum smágenta og sum ung genta plagdi at koma norður til Leirvíkar at vitja teg og ommu. Eg var hjá tykkum hvørja einastu feriu og eisini ofta í vikuskiftinum, og tað var altíð gott at verða har.



Tú hevur altíð dámt væl at arbeiða, og altíð hevur tú stákast við okkurt í frítíðini. Tað eru ikki smáting, tú hevur avrikað gjøgnum árini, og alt tað túhevur gjørt, hevur tú gjørt so grundiga, aldri nakað hálvgjørt. Tú hevur altíð lært okkum, at "man kann alt, bara man vil".

Tað, sum eg minnist, er ikki so nógv av teimum 85 árunum, tú nú hevur livað, men mær er fortalt, at tað ikki altíð hevur verið so lætt. Tú hevur, eins og mangir menn á tínum aldri, mangan stríðst og strevast, og mangan var tað smáligt við pengum. Men hettar er alt áðrenn mína tíð.

Øll sum kenna teg, vita um tín forkærleika til Ísland, og tey fólkini tú kennir har. Og hettar eru fólk og eftirkomarar hjá teimum tú lærdi at kenna, tá tú vart til lands í Íslandi fyri mongum árum síðani.

Tá eg skrivi nakrar reglir til tín abbi, so kann eg ikki lata verða við at nevna títt andaliga lív eisini, tí tað er ein so stórur partur av tínum og ommusa lívi. Tit hava aldrin skammast av at hoyra Harranum til. Og tað sæst so týðuliga á tykkara livihátti. Hjá tykkum hevur Bíblian altíð ligið frammi og altíð verið lisin, og tað er líka so náttúrligt sum maturin á borðinum. Og so hava tit bæði altíð verið trúføst í samkomuni Hebron í Leirvík, og eru tað enn.

At koma inn til tykkum er altíð gott. Blíðskapur og hjartalag sermerkir tykkara heim. Man kemur aldrin á gátt, uttan at omma borreiðir við heimabakaðum og einum góðum drekkamunni. Og abbi er altíð so blíður, og honum dámar so sera væl at tosa við gestir.

At øll kenna seg væl í heimi tykkara, kann eingin ivi vera um. Aldrin havi eg vita eitt heim, hvar so nógv fólk koma á gátt, sum hjá tykkum. Tað er ikki ein dagur, har ikki fleiri fólk hyggja inn til tykkum, og hettar dámar tykkum jú so væl. Serliga nú hvar tit eru vorðin eldri bæði tvey, og ikki koma so nógv út longur, so er tað so hugnaligt at fáa gestir, og at frætta nýtt.

Abbi, nú ert tú 85 ár, og sum tú sjálvur plagar at siga, so er likamið nógv viknað. Tú ert vorðin eldri, og tú orkar ikki so nógv longur. Men tó fert tú av og á ein lítlan túr yvir í Eldrasambýlið, har tú vitjar og kanst tosa við fólk tú kennir, og tað dámar tær so væl.

Dagurin í dag, er bæði tín 85 ára føðingardagur, og so skal Filip, abbasonurin, eisini giftast í dag, so hetta er av sonnum ein gleðisdagur.

Góði elskaði abbi, eg vil enda við at ynska tær hjartaliga tillukku við føðingardeginum, og má Harrin signa teg og ommu so ríkiliga framyvir eisini…

Kærar heilsur

**abbadóttir**

---

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Pætur Franklin Sørensen** í Klaksvík fer av kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í kvøld kl. 18 heim í Kristianskirkjuna. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13.30.

Tey, ið vilja minnast Pætur Franklin kunnu lata Norðoya Ellis- og Vistarheimi eina gávu.

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá ið kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Hjørdis Djurhuus**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

*Vegna tey avvarðandi*

**Kristin, Malan, Annika, Tormóður og Hjarnar**

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra kona mín, mamma, vermamma, omma, langomma og systir okkara

**Elsebeth (Ebba) Jacobsen**
Miðvágur

doyði og varð jarðað.

Takk fyri uppringingar, blómur, kransar og peningagávur til Skandinavisku Barnamissiónina.
Takk til Dánjal á Dul Jacobsen og Thomas Juul Askham fyri góð orð.
Takk til Theodor Petersen fyri vakran sang og Anfinn Hansen fyri spæl.
Ein serstøk tøkk til tykkum á Ellis- og røktarheiminum í Vágum, ið vóru um hana.
Hjartans tøkk til øll tykkum, ið á ymiskan hátt veittu okkum hjálp til jarðarferðina og til ervið.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til gravar.

*Familjunnar vegna*

**Ludvig, Jacobina, Kirstin, Hans Anthon og Lona**

---

# Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum á ymsan hátt gleddu meg á áttati ára degnum 3. juli.

**Bestu heilsanir**
**Maja Olsen**